Hanus Eliasen, ÍF:

## – Vit vóru vanda-miklari

Ungi og evnaríki miðvallaleikarin hjá ÍF, Hanus Eliasen, helt eftir dystin, at tað var fult uppiborið, at ÍF vann á NSÍ. Hanus helt dystin verða javnan, men at ÍF hevði verið nógv tað vandamiklara liðið. Eisini helt Hanus, at brenda brotssparkið hjá NSÍ lyfti heimaliðið, meðan søgan kanska hevði verið ein heilt onnur, um NSÍ hevði skorað.

Hanus Eliasen var væl nøgdur við avrikið hjá fuglfirðingum sunnudagin, og hann helt, at allir mans hjá ÍF kempaðu væl og høvdu trúnna upp á, at teir fóru at vinna dystin. Hanus segði eftir dystin, at hann helt álopsspælið hjá ÍF koyra sera væl í dystinum, og tað tóktist sum um runavíkingar ongantíð av álvara fingu spælið hjá sær at hanga saman.

**tn**

Jónstein Petersen, NSÍ:

## - Vit fáa ikki glið á spælið

Tað var ein ógvuliga vónbrotin Jónstein Petersen, ið vit fingu orðið á eftir dystin móti fuglfirðingum. Jónstein var als ikki nøgdur við avrikið hjá NSÍ, og hann segði, at NSÍ als ikki fær glið á spælið hjá sær. Vit hava alt ov nógvar feilavleveringar, segði Jónstein og legði afturat, at tað ongantíð eydnaðist hjá teimum at koma upp í gear. Hetta sást eisini aftur, helt Jónstein, tí NSÍ hevði alt ov trupult við at skapa nakrar málmøguleikar.

Jónstein Petersen heldur, at um NSÍ skal hava nakran møguleika at gera nakað við GÍ, nú liðini hittast í fjórðingsfinaluni í kappingini um Løgmanssteypið komandi vikuskifti, so noyðist NSÍ at sýna størri stríðsvilja og fáa glið á spælið hjá sær.

**tn**

ÍF-NSÍ 4-2 (2-1)

# Brotsspørk vóru avgerandi

**Uppflytararnir úr Fuglafirði vunnu sunnudagin 4-2 á oyggjarfeløgunum úr Runavík. Avgerðin fall stutt fyri hálvleik, tá ið stóri spælarin í dystinum, Magni á Lakjuni, legði ÍF á odda 2-1 við brotssparki, stutt eftir at runavíkingar misnýttu eitt brotsspark**

1. DEILD

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Teir mongu áskoðararnir, ið høvdu leitað sær til dyst í Fuglafirði millum ÍF og NSÍ sunnudagin fingu valuta fyri pengarnar. Dysturin var undirhaldandi og málríkur, og serliga fuglfirðingar borðreiddu til tíðir við stak góðum og skjótum fótbóltsspæli.

### Avgerandi løtan

Fuglfirðingar komu á odda tíðliga í dystinum, tá ið runavíkingar gjørdu sjálvmál. Jens Martin gleið, tá ið hann skuldi taka ímóti eini afturlegging, og bólturin trillaði í tóma málið. Nakað eftir hetta eydnaðist tað gestunum úr Runavík at javna, tá ið Helgi L. Petersen stútaði eitt innlegg undir Karstin Joensen í málinum hjá ÍF til 1-1. Hetta málið noyðist Karstin helst at taka á sínar herðar.

Tá ið okkurt um ein hálvur tími var farin av dystinum, kom avgerðandi løtan. Fyrst fóru runavíkingar í álop, og Jónstein Petersen smeyg sær inn í brotsteigin hjá ÍF, har hann bleiv feldur, og dómarin ivaðist ikki, men dømdi brotsspark. Sjúrður Jacobsen var settur at skjóta, men Karstin hevði lúrt hann av og bjargaði væl. Bert fáar minuttir seinni var vandi á ferð í hinum endanum av vøllinum. Bartal Eliasen, ið nú er blivin álopsleikari, var um at gerast leysur í brotsteiginum hjá NSÍ, men har var hann forðaður ólógliga av Óla Hansen, og so vóru tað fuglfirðingar, ið fingu brotsspark. Besti maður á vøllinum, Magni á Lakjuni, skoraði hegnisliga, og heimaliðið var á odda 2-1. Magni var framúrskarandi sunnudagin, og hvørja ferð hann hevði bóltin, var vandi á ferð. Við sínum frálíka teknikki hevur hann lætt við at snýta mótstøðumenninar, og tískil hevði NSÍ ofta tveir verjuleikarar á honum, og tað gav sjálvsagt størri rásarúm hjá viðleikum hansara.



*Verjuleikarin hjá ÍF, Rúni Elttør, skoraði annað vikuskiftið á rað*

*savnsmynd*

### Fuglfirðingar við yvirlutan eftir steðgin

Hóast tað Ian Højgaard javnaði fyri NSÍ stutt eftir steðgin við einum frálíkum langskoti, ið tók í stongina heilt uppi við samankomingina, so tóktist tað sum um, at tey bæði brotsspørkini í fyrra hálvleiki gav ÍF avgerðandi yvirvágina á vøllinum.

Í fyrra hálvleiki hevði spælið verið rættuliga javnt, men eftir steðgin var ÍF greitt tað betra liðið. Gamaní høvdu runavíkingar bóltin eins nógv og vertirnir, men tað gekk ógvuliga striltið hjá teimum at skapa nakað fram eftir vøllinum. Fuglfirðingar vóru hinvegin rættuliga vandamiklir framman fyri málinum hjá Jens Martin Knudsen, og tað gav eisini úrslit.

Um miðjan seinna hálvleik fekk ÍF fríspark úti í øðrum borðinum. Verjan hjá NSÍ brúkti nógva orku upp á at ansa eftir Bartali, og tað gav rúmd fyri øðrum leikarum hjá ÍF, og ein teirra, Rúni Elttør, kastaði seg fram við nærmastu stong og møtti frísparkinum við einum flúgvandi headara, sum streyk í málið, og so var ÍF á odda 3-2. Eina løtu seinni øktu fuglfirðingar um leiðsluna við einum væl gjøgnum spældum álopi. Hanus Eliasen spældi Bartal Eliasen leysan í vinstra borði, og Bartal gjørdi skjótt av og spældi beinan vegin inn fyri til Eyðolv Petersen, ið kom tuskandi, og hann beindi bóltin í netið, og so var dysturin avgjørdur. Hetta seinasta málið var sera skjótt og væl spælt, og spælararnir hjá ÍF rørdu bóltin bert eina ferð, áðrenn hann bleiv spældur víðari, og tað gjørdi, at verjan hjá NSÍ ongantíð kom upp á pláss, áðrenn bólturin lá í málinum.

Seinastu løtuna av dystinum var spælið heldur tilvildarligt, men tað var nærri 5-2 til ÍF, enn tað var, at NSÍ fekk pyntað um úrslitið.

**ÍF-NSÍ 4-2 (2-1)**

1-0 Sjálvmál
1-1 Helgi L. Petersen
2-1 Magni á Lakjuni brts.
2-2 Ian Højgaard
3-2 Rúni Elttør
4-2 Eyðolvur Petersen

Royn-LÍF 6-0 (3-0)

# Stórsigur til uppflytararnar

Hvalbingar gjørdu bart, tá ið teir leygardagin fingu vitjan av leirvíkingum. Uppflytararnir úr Royn vundu burtur úr LÍF, sum ongantíð fingu fótin fyri seg í dystinum. Tað gekk ikki long tíð, áðrenn stóri spælarin í dystinum, Gisli Sveinbjørnson, legði heimaliðið á odda 1-0, og sami maður økti seinni í fyrra hálvleiki til 2-0. Áðrenn leirvíkingar fingu høvi til at koma í skiftingarrúmið í hálvleikssteðgin at tosa um, hvussu teir skuldu steðga hvalbingum, eydnaðist tað Royn at punktera LÍF, tá ið Sasha økti um leiðsluna til 3-0 til Royn, sum eisini var hálvleiksstøðan.

Spenningurin var nú fullkomiliga farin úr dystinum, men hetta merkti tó ikki, at vertirnir tóku sær av løttum, tí teir hildu fram við sínum ágangandi spæli, og Gisli Sveinbjørnson økti til 4-0 við sínum triðja máli í dystinum. Sasha smæddist heldur ikki burtur, og hann skoraði til 5-0, áðrenn Rúni Thomsen setti punktum, tá ið hann skoraði til endaligu støðuna 6-0 til Royn. Við sigrinum hevur Royn nú tryggjað sær síni fyrstu stig í landskappingini, meðan LÍF enn einki stig hevur.

**tn**

**Royn-LÍF 6-0 (3-0)**

1-0 Gisli Sveinbjørnson
2-0 Gisli Sveinbjørnson
3-0 Sasha
4-0 Gisli Sveinbjørnson
5-0 Sasha
6-0 Rúni Thomsen



B68–GÍ 0–2 (0–2):

# Gøtumenn halda stílin

**Á nýggja undirlagnum á Svangaskarði brúktu teir fyrra umfarið at skjóta tvey mál, og so bíðaðu teir eftir heimaliðnum, sum vildi men ikki megnaði at koma afturíaftur**

B68–GÍ

*Jóannes Hansen*

GÍ er á aldukambinum. Eftir fult stigatal í steypakappingini hava teir í landskappingini hildið fram við somu ferð. Tveir dystir og tveir sigrar og teir eru einsamallir á odda.

Hjá B68 liggur illa fyri. Teir eru foknir úr steypakappingini, og í landskappingini eru teir eftir tvey tey fyrstu umførini sørir – einki stig og einki mál.

Tí var einki at siga til, at tað var munur á, eftir at hornorkestrið hevði blást og borgarstjórin hevði hildið røðu.

Gøtumenn eru væl skipaðir. Málverjin er tryggur. Í miðverjuni hevur Poul Enngarð fingið nýggjan makkara. Hann og Atli Gregersen tykjast longu vera væl samanspældir, vongverjarnir gera sítt, og á miðvøllinum kenna allir sín setning. Eftir fimm minuttir var neyðugt at skifta út, tí Hanus Jacobsen hevði beklað. Beiggi hansara, Poul Henning Jacobsen, flutti aftur á vongverjan, og Símun Louis Jacobsen varð settur inn á miðvøllin. Tað gekk upp á stás og seks minuttir eftir útskiftingina hevði GÍ lagt seg framum.



*Gøtumenn liggja nú einsamallir á odda í 1. deild við fullum stigatali.*

*savnsmynd*

Hjá B68 er tað tungt. Tá ið man á heimavølli ikki hevur fleiri enn ein spælara heilt har frammi, so ber tað sjálvandi boð um, at tað fyrst og fremst um at binda fyri í verjupartinum. Eftir at GÍ stutt undan hvíldini hevði økt um leiðsluna, vóru fyritreytirnar heilt broyttar fyri seinna umfarinum. Tá royndi B68 at flyta spælið fram og trýsta, men teir vóru ikki nøkur serlig hóttan fyri oddaliðið.

Undan steðginum rakti Mikkjal Thomassen ikki nóg væl eftir innlegg, og Øssur Jacobsen megnaði ikki við høvdinum at stýra nóg væl eftir eitt annað innlegg. Í 2. hálvleiki sendi Øssur Hansen fríspark á træverkið, og Mortan Hansen, sum síðsta korterið loysti Súna Fríða av, hevði gott skot, sum Hallur Hansen bjargaði væl.

### Málini

GÍ gjørdi ikki mistøk, og teir dugdu væl at sekta mistøkini hjá mótstøðumonnunum. Popczynski reikaði nógv og var ofta afturi á miðvøllinum, har hann var við sínum góða bóltførleika og vísa eyga fyri spælinum var við til at seta ferð á. Vitus Kofoed er stórur og sterkur, og hann tykist megna væl at halda upp á bóltin, meðan tað verður bíðað eftir, at viðspælararnir skulu koma fram. Hans Pauli Petersen bjóðaði seg til í høgra borði, og Magnus Skoralíð tykist tora alt meiri í vinstru.

B68 verjan gjørdi fleiri fríspørk. Tað var eftir eitt fríspark, sum teir kendu seg noyddar at gera eftir bólttap aftarlaga, at GÍ fekk hol á. Úr høgru sendi Magnus Skoralíð til handara stólpan, har Vitus Kofoed í fimm metra fjarstøðu var púra blankur, tá ið hann í bleytum boga stútaði upp um B68 málverjan.

Tveir minuttir undan steðginum var aftur heilt galið hjá heimaliðnum. Teir mistu í uppspælinum, verjan var komin fram á vøllin, og tá ið Súni Olsen hevði stungið bóltin fram ímillum, hevði Símun Louis Jacobsen nógv pláss og góða tíð at seta framvið B68 málverjanum.

Eftir steðgin var GÍ meiri varðið. Teir bíðaðu, meðan B68 royndi, uttan at teir gjøgdust heilt vandamiklir. Fleiri ferðir var GÍ um reppið at fáa mál, eitt nú tá ið Atli Gregersen eftir horna og úr góðari støðu smekkaði upp um málið. Tað kundu teir gulu og bláu væl liva við.

GÍ er á aldukambinum, og tað er hugaligt hjá teimum – bæði í landskappingini og steypakappingini. Á Toftum kennist tað í løtuni ikki so hugaligt. Teir eru leysir av steypakappingini, og teir bíða framvegis eftir fyrsta stiginum og fyrsta málinum.

**B68–GÍ 0–2 (0–2)**

0–1: Vitus Kofoed 11.
0–2: Símun Louis Jacobsen 43.

**Dómari:** Lassin Isaksen

**B68:** Albert Sævarsson – Oleif Joensen, Herbert í Lon Jacobsen, Kári Sigvardsen, Jákup Eli Olsen – Jóhan Petur Poulsen, Mikkjal Thomassen (Eyðstein Skipanes, 65.), Bogi Petersen, Øssur Hansen, Øssur Jacobsen (Kristian Anton Andreasen, 65.) – Súni Fríði Barbá (Mortan Hansen, 75.)

**Gult kort:** Øssur Jacobsen, Herbert í Lon Jacobsen

**GÍ:** Hallur Hansen – Leivur Hansen, Poul Ennigarð (Jónreid Dalheim, 70.), Atli Gregersen, Hanus Jacobsen (Símun Louis Jacobsen, 5.) – Hans Pauli Petersen, Súni Olsen, Poul Henning Jacobsen, Magnus Skoralíð – Krzyzstof Popczynski, Vitus Kofoed (Poul Arne Jacobsen, 63.

**Gult kort:** einki

## Duttu ov langt aftur

Pauli Jarnskor er hjálparvenjari hjá Krzyzstof Popczynski. GÍ veteranurin, sum í níti árunum var partur av liðnum, ið vann fýra FM heiti á rað, er sjálvandi væl nøgdur við úrtøkuna higartil.

– Vit kunnu ikki annað enn vera nøgdir. Tað verður framvegis arbeitt við at samanspæla spildurnýtt lið, og higartil hevur tað gingið sum eftir ánni. Men nú fara vit at fáa okkum rættuliga royndar. Tað verður strevið í fjórðingsfinaluni í steypakappingini ímóti NSÍ, og í næsta landskappingardystinum, sum verður á heimavølli ímóti B36, fara vit rættuliga at fáa okkum royndar.

Pauli heldur, at teir í 2. hálvleiki á Svangaskarði duttu í so langt aftur.

– Vit vóru frammanfyri 2–0. Um vit høvdu megnað at skora eina ferð afturat, so hevði alt verið avgjørt. Tað verður ofta sagt, at tvey mála leiðsla er vandamikil. Tað kunnu teir í B36 skriva undir uppá, eftir at KÍ kom afturíaftur ímóti teimum. B68 hevði bóltin nógv í 2. hálvleiki, men teir vóru ongantíð rættuliga vandamiklir. Tað halda vit eisini komst av, at okkara verjuspæl var væl skipað.

*jh*

## Fjúrtan ár síðani seinast

GÍ og B68 eru fast inventar í bestu deildini. GÍ hevur verið har síðani 1980, og B68 hevur verið har síðani 1981. Eftir 24 uppgerðir í landskappingini á Svangaskarði sær samantalda úrslitið soleiðis út, at GÍ hevur vunnið trettan ferðir, B68 hevur vunnið fýrar ferðir, og sjey ferðir hevur tað verið javnt.

Sunnudagin vann GÍ fyri aðru ferð 2–0 á Svangaskarði. Fyrra ferðin var í 1990. Sunnudagin fór B68 fyri sjeyndu ferð av heimavøllinum, uttan at tað hevði eydnast teimum at skora ímóti GÍ.

Størsti GÍ sigurin á Svangaskarði var í 1994, tá ið teir vunnu 7–0! Í 2000 vunnu teir 7–3. Síðani tá hevur verið javnt tvær ferðir – 2–2 og 1–1 – og í fjør vann B68 fyri fyrstu ferð síðani 1989. Í fjør var úrslitið 3–2 til B68, men nú var GÍ enn eina ferð omaná. Um tað er nøkur troyst í tí, so kunnu toftamenn ugga seg við, at teir ofta plaga at standa seg betri í Gøtu, enn teir plaga at gera á heimavølli ímóti GÍ.

Í løtuni tykist tað ikki víst at 25. uppgerðin á Svangaskarði millum B68 og GÍ fer at vera næsta ár. Hvussu tað at verða við tí, fer greiða at fáast á fyrst í oktober.

*jh*

B71-Sumba 2-1 (2-1):

## Sandoyingar á stigatalvuna

Sandoyingar reistu seg, eftir at teir seinasta vikuskifti vóru fyri lemjandi ósigri á Sevmýri. Leygardagin hevði B71 vitjan av sumbingum, sum eisini høvdu tapt sín fyrsta dyst, og á heimavølli eydnaðist tað B71 at vinna ein týðandi 2-1 sigur á Sumba.

Øll málini í dystinum komu fyri steðgin. Tummas P. Olsen legði tíðliga í dystinum sandoyingar á odda, tá ið hann við høvdinum bendi einum innleggi frá Clayton í málið, og tað gekk ikki long tíð, so økti Jónsvein Thomsen við einum frálíkum heilfluktara um munin til 2-0 til B71. Sumbingar góvu tó ikki skarvin yvir, og stutt fyri hálvleik eydnaðist tað teimum at minka um munin, tá ið Norbert skoraði til 2-1. Sandoyingarnir vóru omaná fyri steðgin, og teir kundu havt størri leiðslu, men vóru ikki nóg neyvir í avgerandi løtunum.

Gestirnir royndu at trýsta í seinna hálvleiki, men B71 megnaði at halda tørn, hóast teir seinasta korterið spældu við 10 monnum, eftir at Jónsvein Thomsen hevði fingið sína seinnu ávaring.

*tn*

**B71-Sumba 2-1 (2-1)**

1-0 Tummas P. Olsen
2-0 Jónsvein Thomsen
2-1 Norbert